SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY



# EFTIRLITS-ÁTAK

## ferðafólkabátar, sum taka upp í 12 fólk

**FRÁGREIÐING**

2026

www.fma.fo

fma@fma.fo

# Innihald

Inngangur ..... 2
Endamál við átakinum ..... 2
Hvat varð kannað ..... 3
Framferðarháttur ..... 3
Átakið í tølum ..... 3
Úrslit av kanningunum ..... 4
Frávikini, ið vórðu funnin ..... 4
Niðurstøða ..... 5
Góð ráð til bátaførarar og reiðarar ..... 5
Grundarlag og avmarkingar ..... 6
Tal av góðkendum ferðafólkabátum ..... 6
Treytirnar fyri vinnuligari sigling við ferðafólki ..... 6
Lógargrundarlag ..... 6

# Eftirlitsátak við ferðafólkabátum 2026

Sjóvinnustýrið hevur í summar saman við Føroya Politi kannað ferðafólkabátar kring landið. Flestu bátarnir høvdu viðurskiftini ið lagi, men í trimum førum vórðu feilir ella manglar staðfestir. Kanningarnar eru ein liður í arbeiðinum hjá Sjóvinnustýrinum at fremja fyribyrgjandi eftirlitsarbeiði og harvið verja mannalív á sjónum.

## Inngangur

Virksemi við ferðafólkasigling í Føroyum er vaksandi. Serliga um summarið er nógv virksemi, men við vaksandi ferðafólkatalinum kann væntast enn meiri sigling um summarið, men eisini alt árið.

Sjóvinnustýrið fær av og á fráboðanir um, at ávís viðurskifti ikki eru í lagi hjá bátum, ið sigla við ferðafólkum. Tí tók Sjóvinnustýrið stig til at gera eitt átak saman við Løgregluni at kanna, um bátar og manning lúka treytirnar fyri ferðafólkasigling.

Átakið fór fram í tíðarskeiðnum frá juni til august 2026, tá mest virksemi er innan ferðafólkasigling. Fevndir av átakinum vóru ferðafólkabátar, ið taka upp í 12 ferðafólk.

## Endamál við átakinum

Sjóvinnustýrið umsitur lógina um trygd á sjónum. Tað merkir, at Sjóvinnustýrið bæði sýnar og hevur eftirlit við, at vinnulig ferðafólkafør eru smíðað, útgjørd og egnað til tann rakstur, sum tey virka í. Sjóvinnustýrið umsitur eisini manningarreglurnar. Eftirlitið er ein partur av arbeiðinum hjá Sjóvinnustýrinum at tryggja, at ferðafólk kunnu ferðast trygt á sjónum, og at tey, sum reka vinnuligan ferðafólkaflutning, fylgja galdandi reglum.

**FAKTA:** Ferðafólkabátarnir, sum átakið fevndi um, eru minni enn 20 bruttotons, sigla strandarsigling og taka upp í 12 ferðafólk.

**FAKTA:** Tað eru  serlig útbúgvingarkrøv til manning á ferðafólkabátum, alt eftir støddini á bátinum.

## Hvat varð kannað

Í átakinum kannaðu vit hesi viðurskifti:

- Um báturin hevði galdandi ferðafólkaloyvi umborð
- Um tal av ferðafólki samsvaraði við mest loyvda ferðafólkatal fyri einstaka bátin
- Um bjargingarútgerðin var í lagi og í rættari nøgd og rætt staðsett
- Um trygdarvegleiðingin var tøk umborð
- Um manningin hevði rættar førleikar
- Um tal av manning var samsvarandi reglunum
- Um bátar uttan ferðafólkaloyvi sigldu vinnuliga við ferðafólkum

## Framferðarháttur

Eftirlitið fór fram frá 4. juni til 19. august 2026.

Í hesum tíðarskeiði gjørdi Sjóvinnustýrið í alt 17 kanningar av 13 ferðafólkabátum. Nakrir bátar vórðu sostatt kannaðir meira enn eina ferð.

Eftirlitið fevndi um bátar, sum hava virksemi ymsastaðni í Føroyum og eisini um bátar, sum vóru í virksemi í samband við stevnur og tiltøk.

Bátar vórðu kannaðir áðrenn fráferð, ella tá teir komu aftur av túri.

## Átakið í tølum

| | |
|---|---|
| **Tíðarskeið:** | 4. juni til 19. august 2026 |
| **Kanningar:** | 17 kanningar |
| **Bátar:** | 13 ymiskir bátar |
| **Viðmerkingar ella manglar:** | 3 kanningar |

## Úrslit av kanningunum

- 11 bátar høvdu galdandi ferðafólkaloyvi.
- 2 bátar høvdu ikki ferðafólkaloyvi, men hesir sigldu ikki vinnuliga.
- Av teimum 11 bátunum við ferðafólkaloyvi vórðu frávik funnin umborð á tveimum. Á tí eina bátinum vórðu frávik funnin á tveimum vitjanum.

## Frávikini, ið vórðu funnin

- Manningin taldi ein persón, har kravið er tveir.
- Sýnið av bjargingarbátinum farið út um tíð (útgingin).
- Bjargingarútgerð var ikki til øll umborð.
- Ein bátur var á veg avstað við ov nógvum ferðafólkum. Hetta varð steðgað áðrenn fráferð, so hann fór avstað við loyvdum ferðafólkatali.
- Uppslag við ferðafólkaloyvi manglaði.
- Trygdarvegleiðingin var ikki tøk, og manningin varð ikki gjørd kunnug við trygdarvegleiðingina.
- Manningin hevði ikki síni persónligu skipsskjøl umborð (hesi eru eftirfylgjandi send Sjóvinnustýrinum og eru í lagi).

Í einum føri er talan um politimál, har Føroya Politi sendir bátaførara og reiðara sektaruppskot.

**FAKTA:** Á førum, sum hava dimensiónstal upp á 20 ella meira, skal manningin telja minst tveir persónar.

**FAKTA:** Allar trygdartreytir, ið bátar, sum hava vinnuligt virksemi skulu lúka, eru greinaðar í kunngerð nr. 104 frá 9. juli 2019 um at sigla við førum, ið taka upp í 12 ferðafólk.

## Niðurstøða

Eftirlitsátakið vísti, at flestu bátar, ið sigla við ferðafólkum, hava viðurskiftini í lagi, bæði tá tað kemur til førleikakrøv til manning og krøv til bát og trygdarútgerð.

Samstundis vísti átakið, at tørvur er á framhaldandi eftirliti. Við regluligum og sjónligum eftirliti kann Sjóvinnustýrið vera við til at tryggja, at reiðarí og manning halda galdandi reglur, so ferðafólk kunnu kenna seg trygg.Tað er visiónin hjá Sjóvinnustýrinum at verja mannalív á sjónum. Samstundis er missión okkara at raðfesta og fremja fyribyrgjandi eftirlitsarbeiði. Hetta átakið er liður í hesum arbeiði.

Sjóvinnustýrið og Føroya Politi fara framhaldandi at samstarva og gera ófráboðað eftirlit við ferðafólkabátum. Hetta fyri at ferðafólk kunnu kenna seg trygg, tá tey keypa ein túr við einum ferðafólkabáti, sum Sjóvinnustýrið hevur góðkent.

**FAKTA:** Visiónin hjá Sjóvinnustýrinum: *Vit verja mannalív á sjónum, samstundis sum vit verja umhvørvið og skapa góðar karmar fyri vøkstri í sjóvinnuni.*

## Góð ráð til bátaførarar og reiðarar

Sjóvinnustýrið mælir bátaførarum og reiðarum til altíð at tryggja, at:

- Galdandi ferðafólkaloyvi er til taks og sjónligt fyri ferðafólki, áðrenn siglt verður.
- Manningin lýkur galdandi førleikakrøv.
- Tal av manning samsvarar við støðd á báti smb. kunngerð.
- Kravd trygdarútgerð er umborð og í góðum standi.
- Trygdarútgerðin er lætt atkomulig og klár at brúka.
- Trygdarvegleiðing er gjørd og tøk hjá ferðafólki at kunna seg við.
- Reglurnar fyri ferðafólkasigling verða fylgdar, eisini tá ið siglt verður við vinum og kenningum.

**FAKTA:** Missiónin hjá Sjóvinnustýrinum: *Vit raðfesta og fremja fyribyrgjandi eftirlitsarbeiði, verja rættartrygdina hjá viðskiftafólkunum og handla, tá brot verða framd. Hetta gera vit við eini tænastusinnaðari fakliga sterkari umsiting og tíðarhóskandi talgildum tænastum.*

# Grundarlag og avmarkingar

## Tal av góðkendum ferðafólkabátum

Tann 14. juli 2026 høvdu 37 bátar galdandi ferðafólkaloyvi frá Sjóvinnustýrinum. Yvirlitið fevnir ikki um Norrønu ella skipini hjá Strandfaraskipum Landsins.

Av hesum bátum eru 8, ið hava loyvi til at sigla við fleiri enn 12 ferðafólkum. Hesi eru millum annað tey varðveitingarverdu skipini og førini, ið bjóða túrar fram undir Vestmannabjørgini.

Av teimum 29, sum hava loyvi at sigla við upp til 12 ferðafólkum, eru 6 bátar, ið hava eitt avmarkað loyvisbræv til ferðafólk, av tí at hesir bátar hava eitt dimensiónstal, ið er minni enn 20 (Longd x Breidd) og eina motororku, ið er minni enn 100 kW.

Eftir eru 23 góðkendir ferðafólkabátar við ferðafólkaloyvi til upp í 12 ferðafólk.

## Treytirnar fyri vinnuligari sigling við ferðafólki

Treytirnar fyri vinnuligari sigling við ferðafólki er, at Sjóvinnustýrið hevur góðkent bátin, at hann hevur galdandi ferðafólkaloyvi, umframt at báturin skal vera mannaður sambært galdandi reglum.

## Lógargrundarlag

- Kunngerð nr. 39 frá 2017 (Fráboðan F)
- Kunngerð nr. 104 frá 2019 (Um at sigla við førum, ið taka upp í 12 ferðafólk)
- Kunngerð nr. 102 frá 2019 (Um manningarásetan á førum, sum sigla við upp í 12 ferðafólkum)

| **Kunngerð 104 frá 2019** | |
|---|---|
| Hevur báturin galdandi ferðafólkaloyvi | Skjal 1 regla 3, 1<br>Skjal 2 regla 2, 1 |
| Er ferðafólkaloyvið tøkt umborð | Skjal 1 regla 3, 6<br>Skjal 2 regla 2, 6 |
| Er møguligt miðsýn hildið og avrit sent Sjóvinnustýrinum | Skjal 1, regla 2, 2.3 |
| Er trygdarvegleiðing gjørd, og er førarin kunnaður um vegleiðingina | Kunngerð 104, §4 stk 5 |
| Hava ferðafólk møguleika at verða kunnaði um trygdarvegleiðingina | Kunngerð 104, §4 stk 6 |
| **Kunngerð 102 frá 2019** | |
| Er talið av manning samb. krøvum | § 2 stk 1-3 (dim>20 => 2 mans)<br>§ 6 stk 1-3 (dim<20 => 1 maður)<br>§ 9 (kW>100 => 2 mans) |
| Hevur førarin kravdu førleikar | § 3 stk 1-4 (Dugnaskap, heilsuprógv, trygdarskeið 1.1 og 1.3, Radioskeið) |
| Hevur hjálparfólk kravdu førleikar | § 4 stk 1-4 (Heilsuprógv, trygdarskeið 1.1 og 1.3, upplæring) |